Álit

í

løgtingsmáli nr. 65/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum (Hækka játtanarkarmin frá 252 mió. kr. til 522 mió. kr.)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 8. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 10. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. januar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Landsverki.

Ein samd Fíggjarnevnd hevur hesar viðmerkingar:

Í galdandi løgtingslóg nr. 58 frá 25. mai 2009, § 1, stk. 2, um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum, er ásett, at byggiútreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 252 mió. kr.

Orsøkin til hetta lógaruppskotið um at broyta verklagslógina er at fáa heimild til at hækka játtanarkarmin til verkætlanina til 522 mió. kr., sum svarar til eina dagførda kostnaðarmeting, íroknað væntaðar príshækkingar, sum verða einar 35 mió. kr. Sostatt kann landsstýrismaðurin gera bindandi avtalur yvir fíggjarár fyri alla verkætlanina og fara undir at gera tunlar norður um Fjall, við tilhoyrandi vegagerð. Eisini verður ásett, at lógin fer úr gildi 31.desember 2027.

Seinastu árini eru tveir tunlar boraðir (á landi) í Føroyum – Viðareiðistunnilin og Hvalbiartunnilin - og nú verður sjøtul settur á at bora tunlar norður um Fjall. Áhugavert er tí at kenna prísgongdina fyri tunlarnar, og hevur nevndin fingið hesar upplýsingar frá Fíggjarmálaráðnum.

Viðareiðistunnilin varð liðugur í 2016. Hann er 1,9 km. Við byggiplássi, eykaavtalum og prísvøkstri sigur Landsverk, at hann kostaði 62,7 mió. kr. fyri kilometurin. Tá er roknað við, at tunnilin eigur 80% av byggiplássútreiðslunum.

Hvalbiartunnilin verður liðugur í 2021. Hann er 2,4 km. Við byggiplássi, eykaavtalum og prísvøkstri sigur Landsverk, at hann kostar 80,2 mió kr. fyri kilometurin. Tá er roknað við, at tunnilin eigur 80% av byggiplássútreiðslunum.

Tunlarnir norður um Fjall verða eftir ætlan lidnir í 2024. Teir verða 4,1 km. Við byggiplássi og prísvøkstri verður mett, at tunlarnir kosta 95,5 mió. kr. fyri kilometurin. Tá er roknað við, at tunnilin eigur 80% av byggiplássútreiðslunum.

Nevndin ásannar, at hvør kilometur av tunli er vorðin dýrari, sum árini eru liðin. Orsakirnar eru fleiri og her kunnu m.a. nevnast orsakir sum trygdarkrøv og so lønar- og prísvøkstur, sum heilt víst hava viðvirkað til øktan kostnað fyri hvønn kilometur av tunli.

Nevndin tekur undir við at hækka játtanarkarmin frá 252 mió. kr. til 522 mió. kr.

Fíggjarnevndin staðfestir, at tunlarnir norður um Fjall verða framdir samsvarandi langtíðar løguætlan fyri hesar tunlarnar. Í áravís hevur breið politisk semja verið um, at tunlarnir norður um Fjall skuldu gerast aftaná Hvalbiartunnilin. Fíggjarnevndin mælir landsstýrinum til at virka fyri

breiðari politiskari semju um teir tunlar, ið standa á skrá aftaná tunlarnar norður um Fjall, soleiðis at størri vissa fæst fyri fólk kring landið, nær tunnilin í teirra øki verður gjørdur, og soleiðis at arbeiðast kann meira effektivt og miðvíst við útbygging av samferðslukervinum í Føroyum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 19. januar 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	